| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 28. juni 2011 |
| Býráðsfundur nr. | 07/2011 |
| Borgarstjóri | Sigurð S. Simonsen |
| Fundarskrivari | Marin Sólheim Thomsen |
| | |

Ár 2011 tann 28. juni kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 23. juni 2011 um innkalling til fundar. Talan er um útsetta býráðfundin frá 23.juni 2011, sum borgarstjórin hevði tikið avgerð um at flyta 5 dagar framm.

**Møtt vórðu:**
Sigurð S. Simonsen
Gordon M. Petersen
Kristina Toftegaard Larsen
Jann Toftegaard
Eyðun á Lakjuni
Magnus Midjord
Petur Abrahamsen
Bjørghild Arnholdtsdóttir
Elisabeth D. E. Olsen

Gordon M. Petersen møtti sum varalimur fyri Dánjal Vang og Bjørghild Arnholdtsdóttir møtti fyri Sonna á Horni, sum bæði høvdu forfall til fundin

**Skrivari:** Marin Sólheim Thomsen, skrivari

Tá borgarstjórin hevði sett fundin bað Kristina T. Larsen um eina viðmerking, har hon undrast á at mál nr. 9 er fyri læstum hurðum.

**Mál nr. 16/2011.**

## Mál viðv. 2. viðgerð av eykajáttan til samvirknar talvur til Fuglafjarðar skúla

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá skúlasjóranum við Fuglafjarðar skúla, dagfest 11. mai 2011 um at veita skúlanum eina eykajáttan til keyp av samvirknum talvum til skúlan, grundað á at eingin játtan er til tílíkt keyp á fíggjarætlan kommununar fyri 2011, soleiðis at hesar kunnu verða klárar til nýtslu komandi skúlaár.
Mentamálanevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 16. mai 2011 og mælir fíggjarnevndini/býráðnum til at 5 samvirknar talvur verða keyptar til skúlan í inniverandi fíggjarári, og at heitt verður á fíggjarnevndina/býráðið um at veita eina eykajáttan til keyp og monteran av hesum 5 talvum fyri ein mettan kostnað upp á kr. 25.000,00 fyri stykkið ella tilsamans kr. 125.000,00, hetta vísandi til § 41, stk. 1 og 2 í í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 19. mai 2011, fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum frá mentamálanevndini samstundis sum mælt verður til at eykajáttanin til keypið verður fíggjað av rakstrarstaði 20.52.11.530.01 "Partafelagsskattur" konto 618000.

Málið hevur verið til viðgerðar á býráðsfundi tann 26. mai 2011 og varð samtykt at taka undir við tilmælunum frá mentamálanevndini og fíggjarnevndini og beina eykajáttanina til 2. og endaliga viðgerð, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. Mai 2000 um kommunustýri.

**Avgerð á býráðsfundi 28 juni 2011:**

Tilmæli frá mentamálanevndini og fíggjarnevndini varð samtykt. Sostatt varð fyriliggjandi uppskot til eykajáttan til samvirknar talvur til skúlan endaliga samtykt. (9-0).

**Mál nr. 17/2011.**

**Mál viðvíkjandi møguligum keypi av Ford 350 akfari til Fuglafjarðar sløkkilið.**

Fíggjarnevndin hevur á fundi tann 19. Mai 2011 viðgjørt mál um møguligt keyp av einum nýggjum Ford 350 akfari til Fuglafjarðar sløkkilið, hetta í sambandi við upprit, sum gjørt er frá fundi millum býráðsskrivaran og eigaran á akfarinum.

Nevndin var á fundinum samd um, áðrenn endalig støða verður tikin í málinum, um at heita á brunanevndina um at fremja sína viðgerð og koma við sínum tilmæli til fíggjarnevndina, eins og nevndin eisini ynskir, at leiðarin fyri Fuglafjarðar sløkkiliði kemur við eini skrivligari frágreiðing, sum undirbyggir áheitanina um eitt møguligt keyp av nýggja akfarinum.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í brunanevndini tann 30. mai 2011, og mælir nevndin fíggjarnevndini og býráðnum til, at innsatsakfarið Ford 350, sum er nýtt, verður keypt.

Nevndin mælir fíggjarnevndini/býráðnum til at finna neyðuga fígging til omanfyri nevnda keyp í 2011 kr. 210.000,00, meðan írestandi fíggingin kann verða gjørd við avseting til íløgukeyp á fíggjarætlan kommununar fyri 2012.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 23. juni 2011 og mælir ein samd nevnd býráðnum til at taka undir við tilmælinum frá brunanevndini, og at upphæddin til keypið fyri 2011 kr. 210.000,00 verður fíggjað av verandi játtan.

Somuleiðis verður mælt til, at restupphæddin kr. 200.000,00 verður avsett á fíggjarætlan kommununar fyri 2012.

Dánjal Vang, varaborgarstjóri luttók á fundinum í fíggjarnevndini, meðan hetta mál varð viðgjørt og tilmæli latið býráðnum, við tað at borgarstjórin varð ógjegnigur.
Vegna ógjegni varSigurð S Simnsen úti undir viðgerðini av málinum.
**Avgerð á býráðsfundi 28 juni 2011:**
Tilmælið frá fíggjarnevndini varð samtykt soleiðis at akfarið verður útvegað og fíggjað av verandi játtan í 2011. (8-0).
**Samstundis sum eitt samt býráð mælir borgarstjóranum til at taka upp samráðingar við Eysturkommunu um samstarv á brunaøkinum við felags brunastøð v.m.**

**Mál nr. 18/2011.**

**Mál viðv. umsókn frá Hans Erling Hansen um byggiloyvi til umbygging av sethúsum sínum.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Hans Erling Hansen, dagfest 21. juni 2011 um byggiloyvi til at lyfta yvirtromina upp á báðum síðum á sethúsum sínum á matr. nr. 627 á Kirkjuvegi 8 í Fuglafirði sambært viðlagdari tekning.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 22. juni 2011, og metir nevndin tær innsendu tekningarnar, sum fylgja við málinum, at verða alt ov mangulfullar til at útskriva eitt byggiloyvi eftir. Men sambært galdandi byggisamtykt er einki í vegin fyri, at byggiloyvi kann verða givið til at lyfta húsini upp.

Neyðugt er, at meira fullfíggjaðar tekningar, sum tekniska deildin kann góðtaka, fyriliggja, áðrenn byggiloyvi verður givið.

Viðvíkjandi tekningum verður víst til faldara, sum Kommunusamskipan Føroya hevur gjørt hesum viðvíkjandi.

Treytirnar í almennu byggisamtyktini fyri Fuglafjarðar kommununu og kunngerð um brunaverju frá 09. apríl 1992 skulu verða fylgdar.

Í hesum sambandi verður víst á, at øll búrúm skulu hava minst eitt vindeyga, sum kann verða latið upp við fríum opið, sum er minst 50 cm í breidd og 60 cm høgt. Hædd + breidd á tí fría opinum skulu verða minst 1,50 m.
**Avgerð á býráðsfundi 28 juni 2011:**
Tilmælið frá teknisku nevndini varð samtykt soleiðis at byggiloyvið verður givið tá neyðugu treytirnar um fullfíggjaðar tekningar frá teknisku nevnd eru loknar. (9-0).

**Mál nr. 19/2011.**

**Mál viðv. umsókn frá Roy Róin um byggiloyvi til bilhús á matr. nr. 143cl.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Roy Róin, dagfest 16. Juni 2011 um byggiloyvi til bilhús á matr. nr. 143cl á Sevdalsvegi 3 í Fuglafirði sambært viðløgdum tekningum.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini 22. Juni 2011, og mælir nevndin býráðnum til, at byggiloyvi verður givið til bygging sambært hjáløgdu tekning, solieðis at treytirnar í almennu byggisamtyktini og kunngerð um brunaverju frá 09. apríl 1992 verða fylgdar.

Kloakkplanur skal verða góðkendur av teknisku deildini, og kloakkirnar skulu verða sýnaðar og góðkendar av teknisku deildini, áðrenn tær verða tyrvdar.

Har grivið verður móti granna, skal arbeiðið verða gjørt soleiðis, at bakið verður tryggjað á nøktandi hátt.

Atkoman til bilhúsið skal verða gjørd soleiðis, at ovara síða á gongubreytini verður 5 cm hægri enn kantsteinarnir.
**Avgerð á býráðsfundi 28 juni 2011:**
Tilmælið frá teknisku nevndini varð samtykt soleiðis at byggiloyvið verður givið. (9-0).

**<u>Mál nr. 20/2011.</u>**
**Viðv. umsókn frá Thabor um byggiloyvi til fýrrúm.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Missiónshúsinum "Thabor", dagfest 09. mai 2011 um byggiloyvi til fýrrúm vestan fyri verandi bygning á matr. nr. 520 á Toftagøtu 7 í Fuglafirði sambært viðløgdum tekningum.

Tá ið bygningurin kemur so gott sum í mark móti matr. nr. 521, eigari Henny Joensen, so hevur Thabor útvegað sær úttalilsi frá Henny, og hevur hon við skrivi, dagfestum 09. juni 2011 givið sítt viðmæli til, at bygdur verður ein lítil tilbygningur á/ímóti markinum millum ognirnar matr. nr. 520 og 521.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini 22. Juni 2011, og mælir nevndin býráðnum til, at umsóknin verður gingin á møti, soleiðis at bygt verður sambært hjálagdari tekning.

Mælt verður somuleiðis til, at byggiloyvi verður givið soleiðis, at hurðin í minsta lagi verður BD 60.
**Avgerð á býráðsfundi 28 juni 2011:**
Tilmælið frá teknisku nevndini varð samtykt soleiðis at byggiloyvið verður givið. (8-0).

Vegna ógjegni var Elisabeth D.E.Olsen úti meðan mál nr. 5 var viðgjørt

**Mál nr. 21/2011 tikið av skrá.**

**Mál nr. 22/2011.**

## Mál viðv. umsókn um matstovuloyvi til PrimaVera.

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Primavera, dagfest 23. mai 2011 um matstovuloyvi til pizzaria í bygninginum hjá SP/F Haraldsen (fyrrverandi kioskini) á matr. nr. 695 á Karvatoftum 7 í Fuglafirði.

Primavera hevur ídag matstovuloyvi í Ítróttar- og samkomuhøllini á Kambsdali.

Umsóknin er send kommununi beinleiðis og att. til brunaumsjónina, men við tað at talan er um matstovuloyvi í øðrum bygningi í kommununi, enn verandi loyvi er givið til, so verður umsóknin send til
Politiið í Føroyum
J. Broncksgøta 17
100 Tórshavn
til víðari viðgerðar, við tað at kommunan bert í hesum føri er tilmælandi myndugleiki og ikki loyvisgevari.
Avgerð á býráðsfundi 28 juni 2011:
Býráðið tekur undir við at PrimaVera varðveitir rmatstovuloyvið, treytað av at aðrir góðkennandi mynduleikar eisini geva sítt tilmæli. (9-0).

**Mál nr. 23/2011.**
## Mál viðv. umsókn um pylsusøluloyvi frá ÍF Kappróður.

Steingrím av Vollanum hevur vegna ÍF-kappróður tann 17. juni 2011 tosað við undirritaða um at fáa longt "pylsusøluloyvi", sum felagið hevur fingið játtað til 01. januar 2012, við tveimum árum fram til 01. januar 2014.

Hann varð á veg av landinum, so hann hevði ikki møguleikar sjálvur at senda umsókn inn, og tí verður hetta notat latið býráðnum.

**Avgerð á býráðsfundi 28 juni 2011:**
Býráðið samtykti at forlongja loyvið til 01. januar 2014, og senda fráboðan til politiið. (9-0).

Jánn Toftegaard

Gordon M. Petersen

Bjørghild Arnholdtsdóttir

Kristina Toftegaard Larsen

Eyðun á Lakjuni

Pétur Abrahamsen

Magnus Midjord

Elisabeth D. E. Olsen

Sigurð S. Simonsen

Skrivari:

Marin Sólheim Thomsen